Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR

# Trafalgar Square – staðið har londonbúgvar møtast

**Lord Nelson vann slagið við Trafalgar móti Napoleon Bonaparte. Og nú er Trafalgar Square staðið, har londonbúgvar møtast at hátíðarhalda sigrar og gera vart við seg í einari mótmælisgongu. Lord Nelson stendur mitt á torginum í einari avbera stoltari standmynd, og tú hoyrir næstan orðini: »Ongland væntar, at hvør maður ger sína skyldu«**



Trafalgar Square í miðbýnum í London er bygt til at minnast slagið við Trafalgar í 1805, tá Lord Nelson vann á franska Napoleon Bonaparte. Upprunaliga skuldi navnið havt verið »King William the Fourth's Square«, men George Ledwell Taylor skjeyt upp navnið Trafalgar Square, og soleiðis bleiv.

Norðara økið av torginum hevur verið plássið av King's Mews síðani Edward I dagar, meðan sunnari parturin upprunaliga var Charing Cross, har Strand frá býnum rann saman við Whitehall, norðanífrá frá Westminster.

Sum miðdepilin millum hesar tvíburabýirnar, er Charing Cross í dag at rokna sum miðdepilin í London, har allir avstandir í býnum eru máldir frá.

Í 1820-unum ansetti Prince Regent landslags arkitektin John Nash at menna økið. Nash ruddaði økið sum ein part av hansara Charing Cross Improvement Scheme. Soleiðis, sum torgið sær út nú, er takkað verið Sir Charles Barry og stóð tað liðugt í 1845.

Trafalgar Square er heimstaðið fyri politiskum mótmælisgongum og ítróttaligum sigrum.

Uttan um Trafalgar Square finst The National Museum, sum rúmar klassisku málningunum. Umfram stóru standmyndina av Lord Nelson eru fýra standmyndir av leyvum, sum verja Trafalgar Square. Hesar eru bygdar av Sir Edwin Landseer. Søgan sigur, at metallið, sum er nýtt í leyvunum, er endurnýtt úr fronskum kanónum.

Ein rúgva av øðrum standmyndum finnast eisini á Trafalgar Square, eitt nú George IV, Henry Havelock, Sir Charles James Napier. Fyrrverandi borgarstjórin í London, Ken Livingstone, ætlaði at skifta tveir av generalunum út við nøkrum, sum londonbúgvar kenna betur.

Framman fyri National Gallery standa tvær standmyndir, vestantil James II og eystantil George Washington. Seinni nevnda er ein gáva frá statinum Virginia og hon stendur á grund, sum er innflutt úr USA.

Í 1888 varð reist ein standmynd av Charles George Gordon. Í 1943 varð standmyndin flutt og reist aftur á Victoria Embarkment. Ein busta av Second World War First Sea Lord Admiral Cunningham av Franta Belsky var avdúkað á Trafalgar Square 2. apríl 1967 av Philip prinsi, Jallur av Edinburgh.

Torgið er vorðið ógvuliga týðandi sum sosialt og politiskt symbol fyri vitjandi eins og fyri londonbúgvar sjálvar. Symbolski týdningurin kom veruliga til sjóndar í 1940, tá Nazi SS elvdu loyniligar ætlanir um at flyta standmyndina av Nelson til Berlin eftir eina ætlaða týska innrás so sum Norman Longmate sigur frá í bók síni »If Britain had fallen« frá 1972.

**Puntur nr. 8**



